# Leiðari
## til Mentanarhúsið í Fuglafirði

Starvið sum leiðari fyri Mentanarhúsið í Fuglafirði er leyst at søkja.

**Uppgávur**
Starvið sum leiðari í Mentanarhúsinum er fulltíðarstarv. Uppgávan hjá leiðaranum verður at stíla fyri mentanartiltøkum, at skipa tað dagliga arbeiði og at hava ábyrgd av starvsfólkum í húsinum. Eisini kemur leiðarin at hava ábyrgdina av teimum dagligu fíggjarligu viðurskiftunum so sum innkeyp, fakturering, gjaldingum og lønum v.m.

**Vit kunnu bjóða**
Vit kunnu bjóða tær eitt sjálvstøðugt og spennandi leiðarastarv innan mentanarøkið, har leiðarin í stóran mun sjálvur avgerð innihaldið og fjølbroytni.

**Vit vænta**
Vit vænta at tú hevur royndir sum leiðari og hevur áhuga fyri mentan. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert álitandi, fyrikomandi og at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt. Innlit í fíggjarviðurskifti er ein treyt.

**Tilvísing**
Starvið hevur tilvísing til nevndina.

**Umsókn**
Umsóknir við CV, arbeiðsváttanum, prógvum og møguligum viðmælum verða Fuglafjarðar Sjónleikarafelagi í hendi seinasta lagi 20. november 2003.

Umsóknir skulu stílast til:
Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Postboks 14
530 Fuglafjørður
Viðmerking: Leiðarastarv

**Fuglafjarðar Sjónleikarafelag**

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Fulltíðar avloysarastarv í skiftandi vaktum á **D2** er leyst at søkja til setan 1. januar 2004 til og við 30. juni 2004.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og almanna- og heilsuatstøðingar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja okkum eftir, at starvsfólkið er í støðugari menningini og áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, so sum lækna, sálarfrøðing, ergo- og fysioterapeut. Tað eru vit eitt lið, sum er um hin einstaka sjúklingin.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Meira um starvið fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2 tlf. 313540, lokal 422 ella til Birgit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 351,
ella e-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 28. november 2003 kl. 12.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
**Starvsfólkadeildin**
**100 Tórshavn**

# Sølufólk
## til køksdeildina

Damor sóknast eftir einum røskum og dugnaligum sølufólki til køksdeildina.

**Vit vænta at:**
- Tú ert keypmaður út í æsir.
- Tú torir at hava ábyrgd.
- Tú hevur gott yvirlit og ert vanur við at stýra detaljum.
- Tú veitst, hvussu umráðandi góð kundatænasta er.
- Tú ert lagaligur og tænastuhugaður.

**Tíni ábyrgdarumráði verða:**
- Keypa vørur til handil.
- Kundaavgreiðsla.
- Tilrættalegging av dagliga arbeiðinum.
- Dekoratión av handlinum.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt gott arbeiði í einum støðugt vaksandi handli, har arbeitt verður miðvíst og dynamiskt.
- Møguleika at seta dám á positivu menningina í handlinum – alt eftir kvalifikatiónum.

**Byrjan:**
- 1. januar 2004.

**Umsókn:**
- Send okkum eina skrivliga umsókn við møguligum prógvum og tilmælum. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara og tosa við Rúna Lómstein.

damor
Kvíggjartún 3, Argir, Tlf. 315415 · Fax 319001




# P/F Beta
og
# P/F Kongshavn
**hava fingið nýggj telefonnr.**

| | | |
|---|---|---|
| **P/F Beta** | Tel. 470070 | Fax 470071 |
| **P/F Kongshavn** | Tel. 470070 | Fax 470081 |

**P/F Beta & P/F Kongshavn**
Kongshavn 1
Postboks 111
600 Saltangará

**DVEYLAN**
**Gólv- og vegg vask**



- Vinyl
- Linolium
- Flísar
- Teppir
- Veggir

J.C. Svabosgøta 50
100 Tórshavn
Tlf. 31 41 75

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin



# Sky digital
**4.995,-**
avmarkað

- Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.
- Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital
- Sjálvandi tann tryggasta loysnin
- Fígging kann útvegast

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28




Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline

# Hevur tú hug at læra til roykiavvenjara

Í døgunum 3., 4. og 5. desember verður skeið á Hotel Hafnia fyri teimum, ið ynskja at læra til roykiavvenjara

**Málbólkur**
Skeiðið er ætlað starvsfólki, ið hava áhuga at vinna sær førleika at vegleiða roykjarum, ið ætla at halda uppat at roykja. Serliga verður hugsað um fólk, ið arbeiða innan heilsu-, almanna- og skúlaverkið, so sum lærarar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingar, læknar, apoteksstarvsfólk, sosialráðgevar og onnur. Tað er ein treyt, at luttakararnir ikki sjálvir roykja.

**Um skeiðið**
Skeiðið verður hildið í samstarvi við Kræftens Bekæmpelse í Danmark, Apoteksverkið í Føroyum og Fyribyrgingarráðið. Undirvísingarmálið er danskt. Fullfíggjað skrá finst á heimasíðuni hjá Fyribyrgingarráðnum : www.fyribyrg.fo

Pláss er fyri 30 luttakarum, og fyrireikararnir fara at loyva sær at velja millum umsøkjararnar, so býtið verður javnt millum umrøddu starvsbólkar og partar av landinum.

Skeiðið endar við eini roynd, og luttakararnir fáa prógv, ið ger teir førar fyri at virka sum roykiavvenjarar.

Skeiðið er ókeypis. Fyriskipararnir gjalda fyri skeiðstilfar og mat. Eisini er møguleiki at útvega luttakarum úr Suðuroy og útoyggjum innivist.

Tilmelding verður send Fyribyrgingarráðnum í seinasta lagi 15. nov. á seðlinum niðanfyri

Tilmelding:

Navn: ____________________ Bústaður: ____________________

Starv: ____________________ Royki ☐ Royki ikki ☐




**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 13. november 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**P/F Suðuroyar roykivirki í Porkeri**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo .

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**




Málbólkurin er teir elstu næmingarnir á ungdómsútbúgvingunum umfram tey ungu, sum ikki enn hava valgt sær eina víðari útbúgving og øll, sum hava áhuga í útbúgving annars. Roknað verður við millum 500-1000 luttakarum.

Í Sosialinum leygardagin 29. november verður eitt heft innlegg við helvt um helvt lýsingum og journalistiskum tilfari.

Blaðið verður at liggja ókeypis á skúlum, caféum osv í eina viku umfram til luttakararnar í Norðurlandahúsinum meðan messan er.

Freistin at bíleggja lýsingar er fríggjadagin 14. november.

Ring til **Finnbjørg** á marknaðardeildini 34 18 52 ella send ein teldupost til finnbjorg@sosialurin.fo

*- Vit seta fegin lýsingina upp uttan eyka kostnað!*